

## Á heimasíðuni hjá SEV verður greitt frá um streymslitið á Ólavsøku:

"Tað tók góðar fimm tímar at fáa streymveitinga í rættlag aftur á ólavsøku, og tí fer SEV eisini at endurskoða mannagongdir og styrkja telduskipanir og neyðstreymsskipanirnar, sum taka við, tá brek eru á netinum. Tað gekk sera illa í hond ólavsøkumorgun, tí bæði telduskipanirnar og neyðstreymsskipanirnar slerdu eisini frá, og harumframt gekk illa við samskiftinum millum tey, sum skuldu rætta brekini."

– Stýrið tók tó avgerð um, at seta ein rakstrarleiðara, men trupulleikin er, at hesin arbeiðir undir stjóranum og annars hevur ábyrgd av dagliga rakstrinum hjá SEV. Nýggi rakstrarleiðarin skal sostatt kanna og eftirmeta seg sjálvan og stýrið hevur onki við hendan mannin at gera, sigur Hans Tausen Olsen, sum vil vera við, at allir teir í stýrinum, sum ynsktu at økja um trygdina vórðu varpaðir út. Og tríggir sterkstremsverkfrøðingarnar søgdu allir upp, tí teir fingu sagt ongar uppgávur.

– Serkunnleiki varð einans keyptur uttan fyri húsið ella frá útlendingum. So teir, sum hoyrdu til SEV, stungu í sekkin og fóru til Danmarkar, har teir settu egið virkið á stovn, og hava teir úr at gera har, sigur Hans Tausen Olsen, at enda.

**Greinin varð send Klæmint Weihe til umrøðu. Sí viðmerkingar hansara á næstu síðu.**



*– Hendingin ólavsøkumorgun mátti koma fyri fyrr ella seinni*